Skjal 3

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS

Samferðslumálaráðið
Postrúm 64
FO-110 Tórshavn

Dagur: 4. sept. 2018
Mál: 18/00749-2
Viðgjørt: HP

**Viðv. uppskoti til broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða**

Hervið skal verða boðað frá, at Almannamálaráðið ongar viðmerkingar hevur til ætlaðu broytingarnar í arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Almannamálaráðið vil tó mæla til, at í sambandi við at arbeiðsskaðatryggingarlógin verður broytt, at høvið verður brúkt til eisini at gera tøkniligar broytingar í § 46. Almannastovan hevur broytt navn og eitur nú Almannaverkið, og tí eigur "*Almannastovuni*" at broytast til "*Almannaverkinum*" í § 46 stk. 1 og 2. Eisini er løgtingslóg um sjúkratrygd til fiskimenn sett úr gildi (við løgtingslóg nr. 117 frá 24. november 2016), og fiskimenn eru nú fevndir av dagpeningalógini. Tí kann hetta strikast í § 46, stk. 2: "*ella Lønjavningargrunninum sambært løgtingslógini um sjúkratrygd fiskimanna*".

Í teldubrævinum, sum Samferðslumálaráðið hevur sent hoyringspørtunum, verður víst á, at fylgibroyting m.a. skal gerast í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, sum hoyrir til myndugleikaøki Almannamálaráðsins. Vit skulu í tí sambandi boða frá, at broytingin í dagpeningalógini stendur á løglistanum fyri tingsetuna 2018.

Vinaliga

Heri Petersen
fulltrúi